# Fosturtøka ella ikki

**Katrin Dahl**



Fyri at fáa eitt svar uppá hendan spurning, vildi eg spurt allar tær kvinnur sum hava fingið fosturtøku, hvussu tær hava havt tað aftaná ella seinri í lívinum, um tær hava havt trupulleikar samvitskuliga, ella um tær, seinri í lívinum vóru væl nøgdar við tað tær gjørdu. Eisini er umráðandi at fáa svar frá teimum kvinnum sum fingu gjørt fosturtøku í sínum fyrsta graviditeti, og sum ikki fingu børn seinri.

Kanningin eigur eisini at umfata allar tær kvinnur, sum ynsktu at fáa fosturtøku men sum frá læknans síðu fingu avslag. Bleiv hettar barnið ein so stórur trupulleiki í teirra lívi og halda tær fast við, at betur hevði verið fyri móður og barn, um barnið ongantíð var komið í verðina. Hetta eru relevantir spurningar, sum eiga at svarast.

Og eg spyrji »Hvat er »frí« fosturtøka?«

Ein blaðung genta sum blívur við barn, er neyvan før fyri at taka støðu til um hon skal gjøgnumføra graviditetin ella ikki. Ofta er hon undir stórum trýsti, og kanska hóttanum frá tí manni, sum hon bleiv gravid við. Eisini hevur meiningin hjá foreldrum og kanska vinkonum ávirkan á hana, ja so stóra ávirkan, at hon illa sjálv kann gera sær eina meining.

Hvar er so frælsið?

Hevði mamma mín havt tann hugburð, sum er frammi í dag, um fría fosturtøku, og hevði tað verið frí fosturtøka, tí mamma mín átti síni børn, var eg ivaleyst ongantíð komin í verðina, sum nr. fimm barn í seks ár. Heldur ikki mínum trimum yngru systrum høvdu verið lív lagað, og kanska onkur av teimum eldru eisini vóru skolaði út.

Ein óhugnaligur tanki haldi eg sjálv. Øll mín familja hevði ikki verið til.

Um vit høvdu havt fría fosturtøku, og hugburðurin hjá kvinnum hesi seinastu 100 árini var, at nógv børn eru ein trupulleiki, so vóru vit spard fyri at halda lív í smáplássunum, har vildi alt lív langt síðan verið útdeytt av sær sjálvum.

At danskir fólkatingslimir nú koma her og bjóða sær til at forkoma okkum í fosturlívi, er ein so stór provokatión í móti Føroya fólki, sum vit ikki undir nøkrum umstøðum kunnu góðtaka. Okkara meining mentanarliga, sosialt og etiskt skulu vit hava loyvi til at seta sjálvi.

# Løgmaður skal langa nevan í borðið

**Rúna Sivertsen**



Líka mikið, hvørja støðu vit hava til fosturtøku, so eiga vit ikki at lata danir sleppa at leggja seg út í føroysk viðurskifti.

Tiga vit nú og lata danir óátalaðir blanda seg upp í, hvussu vit lóggeva her á landi, so fer tað at fáa álvarsligar fylgjur fyri Føroyar.

At danskir politikarar gjøgnum felagsskapir leggja seg út í okkara viðurskifti er óhugnaligt! Hvat verður tað næsta, sum onkur tilvildarligur útlendskur politikari fer at leggja seg út í?

Vit hava fyrr verið úti fyri ágangi frá útlendskum felagsskapum, eitt nú Greenpeace móti grindadrápi. Tá hava vit sanniliga talað at, og frá politiskari síðu vart okkum og sagt frá, bæði hart og týðiliga.

Tigur løgmaður nú, so merkir tað, at tað frá føroyskari síðu verður góðtikið, at útlendingar gera seg inn á okkum og sleppa at stýra í Føroyum.

Hetta er prinsipielt og snýr seg ikki um fosturtøku, og tí eigur løgmaður beinanvegin harðliga at átala hetta yvir fyri donsku stjórnini.

## VIÐMERKINGAR

# Nú má fiskimálaráharrin taka høvdið úr sandinum

**Petur S. Johannessen**
*FO-900 Vágur*



Undirritaði hevur fyrr,sett okkara fiskimálaráðharra nakrar relivantar spurningar viðv. uppboðssølu og flutningsstuðli, og hevur undirritaði eisini ført fram í somu grein, at landsstýrið ella landið keypti Fiskamarknað Føroya og optimaliserðaði hetta organ, soleiðis at allur fiskur undir føroyum bleiv landaður og flokkaður í Føroyum, og samstundis bleiv FMF ein non-profit fyritøka, soleiðis at tey bíligu fiskasløgini eisini kundu seljast ella bjóðast út her.

Eg skal í hesum sambandi spyrja, hvat bleiv av kunngerðunum til flutningsstuðilin, tað er átrokandi at fáa at vita hvat landsstýrið ætlar á hesum økinum, og nær?

Alt skuldi verða lagt soleiðis til rættis, at teir stóru fiska keyparirnir uttanlands kundu verða við, tá ið uppboð bleiv og logistikkurin bleiv munandi betraður við dagligum fráferðum til meginlandi, sum tað almenna var við til at menna bæði fíggjarliga og tekniskt, til frama fyri bæði føroyingar og útlendingar fiskakeyparar, og vinnunugreinir annars, men tað er greitt at hetta øki vísir seg ongan áhuga hava hjá fiskimálaráðharranum, kanska tí vitanin um fiskivinnuøkið er minimal, og tí av góðum grundum, ikki kundi svara mær uppá, hvat ætlanin/støðu fiskimálaráðið hevði til hesi bæði mál, sum eru umrødd omanfyri.

Nú meti eg, at fiskimálaráðharrin verður noyddur at siga okkum føroyingum, hvat niðurstøðu fiskimálaráðharrin er komin til, nú arbeiðspláss í fiskaídnaðinum á landi verða flutt til EU hvønn dag, nú verður fiskimálaráðharrin noyddur at taka høvdið úr aftur sandinum og útinna tann setning, sum hoyrir til hansara embætið, nevniliga at finna ta loysnina, sum er best fyri Føroya land, og ikki bert fyri ávís øki í landinum.

Eg meti heldur ikki, at Sambandsflokkurin kann góðtaka, at einki verður gjørt við hesar átrokandi spurningar, og tí er mín áheitan á Sambandsflokkin um at gera nakað við hendan sera stóra trupulleika, og ikki bara lata standa til, sum fiskimálaráharrin ger, tí vinnan á sjógvi/landi hevur eitt natúrligt virkisbúskaparligt áhugamál ella endamál, og ikki eitt samfelagsbúskaparligt áhugamál/endamál, og tí er tað her at politikarir skulu standa sína roynd og gera nakað munagott fyri sína høgu løn, sum er fólkinum og landinum til frama.

Tað er bert at fegnast um, at Skálaberg hevur fingið eina góða avtalu við Marks&Spenser, og at teir hugsa um optimering, hetta skulu teir hava rós fyri, men baksíðan av medaljuni er tann, at um hesi skip kunnu liva við einum lægri liðugtvøru prísi enn hvat flakavinnan í Føroyum kann gera fyri somu vøru, so skjóta vit okkum sjálvi í fótin, og fáa virkini á landi harvið økta kapping frá føroyskum skipum, sum fiska føroyska kvotu, og sum allir føroyingar gjalda nógv fyri, men sera fá fáa ágóðan av, her síggja vit, hvussu trupult tað er, men tað er alneyðugt at finna eina loysn, sum gagnar øllum fólkinum, t. d. kundi tað verði álagt flakatrolarunum at flutt fiskahøvdini til Føroyar til turkingar hesi fara í sjógvin aftur nú, (20-25% er høvd við uggabeini av totalvektini á toskinum), um kvotan er 15 túsund tons eru høvdini 3.750 tons til virkingar og søluvirði turkað er uml. 16,0 mio kr og geva høvdini arbeiði til eini 18 ársverk, so her fara stór virðir fyri skeyti, ella kanska flakatrolararirnir eystanfyri skuldu goldið tilfeingisskatt ella fáa kombinerða kvotina eystanfyri soleiðis at feskfiskatrolararnir eisini fingu tillutað eina toska kvotu eystanfyri, sum skuldi landast og bjóðast úr í Føroyum, ella at øll kvotan eystanfyri bleiv førd fesk/fryst til Føroyar.

Føroyingar eru førandi á saltfiskamarknaðunum í Spania og Italia og hava tí brúk fyri at fáa tosk støðugt, toskurin er tíverri í minking undir Føroyum, hetta tiltak hevði kanska tryggjað okkum ein støðuga tilgongd, eina leveringstrygd og tryggan marknaðarpart í hesum umrøddu londum, og kundi toskurin eisini verið nýtur til aðrar meirvirkaðar variantar í sortimanginum hjá flakavirkjunum og spjaða til tað í forvegin spinkla skiftisavlopið, sum er í vinnuni á landi, og til síðst, men ikki minst, hevði hetta tiltakið skapt arbeiði til fiskaídnaðin á landi í Føroyum.

Frysta flakið hjá Skálaberg verður uppafturtiðnað og selt sum uppafturtiðnað fesk fløk, hetta kundu vit lættliga gjørt í Føroyum eisini uttan at missa nakað økonomiskt, hetta skuldi kanska blivið eitt krav aftur fyri at hava kvotuna eystanfyri, somuleiðis hevði hetta eisini elvt til økt virksemi og harvið stabilitet, tað, sum um ræður er, at tey rættindi, vit hava, koma tí føroyska fólkinum til frama og ikki sum nevnt fleiri ferðir, bert nøkrum fáum til gagns, eg meti ikki at vit missa nakað økonomiskt av hesi orsøk, heldur tvørturímóti.

Her eru bert nøkur dømi um, hvat kann gerast, men hetta er alt upp til okkara politikarar at taka støðu til, og loysa, tað einasta sum ikki má henda er at politikarir lata standa til, tí teir skulu veljast inn aftur næsta løgtingsval.

Her mugu og skulu nógvir kamelar svølgjast hjá politikarum, og breyðpolitikarirnir mugu støðgast, soleiðis at vit kunnu fáa eina haldbara loysn og ikki sum oftani hendir, koma við eini loysn eingin kann liva við, tí breyð-politikararnir hava fingið alt ónógv fingramerkir á loysnini, og arbeiðast má hart fyri at finna eina loysn, sum er langsiktað, og sum kemur øllum okkum føroyingum til gagns, og ikki bert nøkrum fáum.

Mín áheitan til serliga sambandstingmenn og ikki minst til formannin Kaj Leo Johannesen, sum kennir alt til hetta økið, og okkara fiskimálaráðharra og samgonguna sum heild, er at gera tað, sum teir eru settir til, nevniliga at finna tær røttu loysnirnar á fiskivinnuøkinum til frama fyri alt føroya fólk, ongantíð óskjótt, og ikki liggja og dvæla á málum, sum eru sera følsom, eg endirtaki, tað er tí tit politikarir sita í tykkara sessum, at finna semjir, sum enda við haldbarum loysnum, tað krevur at hava bein í nøsini fyri at finna haldbarar loysnir, og ikki er tað lætt, men tað kann ikki góðtakast at koma við eini avlagari loysn á fiskivinnuøkinum, tað hava vit als ikki ráð til í Føroyum, herundir marknaðaratgongd sum er heilt út av lagi vánalig, kvotir/loft, handils/toll-avtalur osv…?, her má landsstýrið seta nógva orku inn fyri at vit kunnu røkka fleiri marknaðum og beina forðingar burtur, so vinnan á landi kann menna seg og økja sítt úrval av vørum/variantum, her er næstan einki gjørt, og má hetta fáa ein upp prioritering, her burdi vinnan verði hoyrd, hvat hon heldur er mest átrokandi at fáa loyst, so her er nógv at taka fat uppá.

Til síðst skal eg siga at tað er spell at vit ikki hava eitt havransóknarskip, sum hevur fabrikk umborð, góða maskinorku og góð spøl (Heyðadrangur hevði verið góður til hetta) so at vit kunnu gagnnýta alt okkara tilfeingi á føroyskum øki, vit vita ikki hvat tilfeingið er í føroyskum sjógvi, og kann hetta skip finna nýggj fiskasløg, nýggjar leiðir og framleiðsluhættir, samt marknaðir, til gagns fyri skip og flakavinnuna á landi, hetta hava vit harliga brúk fyri.

Reiðaríir og flakavinnan hava ikki fíggjarliga orku til tess, hetta er ein uppløgd uppgáva hjá landsstyrinum, at finna útav hvat tilfeingi er undir Føroyum, og kanna um tað kann umsetast til vinnulig endamál.

P.S. Kanska fiskimálaráðharrin greiður okkum føroyingum, hvørja støðu hann hevur til ta, sum borið er fram omanfyri - hesuferð - ???

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Hans Johannes loysir av á brúnni

**Hósdagin 30. september var móttøka á Føroya Sjómansskúla í sambandi við at stjórin, Dániel Johan Poulsen, fór frá, og Hans Johannes á Brúgv tók við sum nýggjur stjóri á trimum skúlum**

MÓTTØKA
*Jens Kristian Vang / Amalia Poulsen*



*Hans Johannes á Brúgv, nýggi stjórin á samanløgdu skúlunum, saman við Daniel Johan Poulsen, sum nú hevur lagt frá sær sum stjóri á Føroya Sjómansskúla*

Stórar broytinar eru farnar fram á maritimu skúlunum í ár. Føroya Sjómansskúli og Maskinmeistaraskúlin og Brandskúlin við Áir hava lagt saman.

Stjórarnir á Sjómansskúlanum og Maskin-meistaraskúlanum, Daniel Johan Poulsen og Gordon Hofgaard, eru farnir frá, og Hans Johannes á Brúgv er nú stjóri á Føroya Sjómansskúla, Maskinmeistaraskúlanum og Brandskúlanum við Áir.

Á móttøkuni á Sjómansskúlanum vórðu talur hildnar av fráfarandi stjóranum, Daniel Johan Poulsen, varaskúlastjóranum, Petur Hans Dahl, nýggja stjóranum, Hans Johannes á Brúgv, Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni og Maluni Marnersdóttir, rektara á Fróðskaparsetri Føroya.



*Hjúnini Daniel Johan og Amalia Poulsen*



*Fráfarndi stjórin saman við familjuni, f.v. Birita L. Poulsen, Heðin D. Poulsen, Hanna Sigurheim, Kári Sigurheim, Daniel Johan Poulsen, Heini Nygaard, Amalia Poulsen, og Elsebeth Bolstad. Bjarki Poulsen vantar á myndini*

Daniel Johan byrjaði við at ynskja Hans Johannes á Brúgv vælkomnum og ynskti honum góða eydnu við stjórastarvinum. Hann segði m.a. at gjøgnum tey 32 árini, hann hevði starvast á skúlanum, harav 10 ár sum stjóri, hevði hann havt við nógv hundrað ungfólk at gera, og hann kundi ikki lata vera við at siga hvussu lagalig øll høvdu verið. Tað verður mangan sagt, at tað er kalt at sita á toppinum, men tað havi eg als ikki merkt nakað til, segði Daniel Johan, samstundis sum hann takkaði fyri ein frálíka tíð saman við lærarum og næmingum.

Petur Hans Dahl segði m.a. í talu síni, at sum leiðari hevur Daniel Jóhan roynst stak væl. Hann hevur við ógvuliga góðum handalag megnað uppgávuna til fulnar, sum um tað var nakað, sum var viðføtt.

Hann hevur torað at gingið á odda við broytingum og nýhugsan.

Hans Johannes á Brúgv segði í síni talu m.a., at tá hann í 1988 var liðugur við skipsføraraútbúgving sína, helt hann eina røðu á skúlanum. Tá hugsaði hann ikki, at hann aftur skuldi halda røðu á Sjómansskúlanum sum komandi stjóri.

Tá segði hann eisini farvæl við Daniel Johan, munurin er tann, at hesaferð varð hann sjálvur eftir í húsinum, meðan Dánjal Johan fór.

Hann vónaði at kunna taka upp arvin eftir Daniel Johan, nú hann kemur at standa fyri samanleggingini, og boðskapurin er, at tað ikki er neyðugt at bróta niður fyri at byggja nakað upp.

Hans Johannes á Brúgv er 41 ára gamal og vestmenningur. Hann gekk í realskúla í Vestmanna og tók HF-skeið í Hoydølum. Tá hann var liðugur við skipføraraútbúgving sína í 1988, sigldi hann sum stýrimaður, til hann fekk starv á Føroya Fiskasølu. Har var hann í tilsamans 13 ár og var stjóri í fimm og eitt hálvt ár.

Eftir tað búði hann saman við familjuni á Spania í eitt ár. 1. januar 2004 tók hann við sum stjóri á Rækjuvirkinum á Oyri og 1. september tók hann við sum stjóri á Maskinmeistaraskúlanum og 1. oktober eisini á Sjómansskúlanum.



*Petur Hans Dahl, varaskúlastjóri, og Daniel Johan Poulsen, við einum málningi hann fekk frá skúlanum*

**Tøkk**

Eina stóra tøkk vil eg fegin bera tykkum øllum, sum á ymsan hátt gleddu meg á 75 ára føðingardegnum.

**Kjartan Mørkøre**